# Konsert og fyrilestur við Suzanne Brøgger

**Fríggjakvøldið 16. mars kl. 19.30 verður konsert og fyrilestur við Suzanne Brøgger í Norðurlandahúsinum.**

BLÅ BIOGRAFI

Suzanne Brøgger er netop udkommet med ny CD/BOG med Blå Biografi, og man kan i den forbindelse engagere Suzanne til en forfatteraften med både oplæsning og musik.

På Blå Biografi kan man høre en lang række af fine jazzmusikere, blandt andre Butch Lacy, Jan Kaspersen, Jesper Bodilsen, Uffe Steen, Christina Dahl, Jesper Lundgaard, Christina Von Bülow, Carsten Dahl mfl.

Blå Biografi udkom d. 17. oktober og der var fulde huse til præsentationskoncerten d. 4. november på den Sorte Diamant i København. Til denne koncert bragte hun med sig Carsten Dahl – Piano & trommer, Christina Dahl – Sax, Jan Kaspersen - Piano, Jesper Lundgaard - Bas, Christina von Bülow-Sax.

En aften i selskab med Suzanne Brøgger og Blå Biografi, er hendes egne nykomponerede blødende



og nærværende sange i Jazz-blues genren. Hertil hører oplæsning fra Blå Biografi bogen. Bogen omhandler hvordan musikken har formet Suzannes liv gennem alle årene.

### Suzanne Brøgger

Født: 18. november 1944 i København. Debut: Fri os fra kærligheden: essays. København, 1973. Er vokset op i Colombo, Sri Lanka, Bangkok og Silkeborg. Studier på Københavns universitet. Jeg tjente til mine studier ved film-teater og modelarbejde.

Takket være en rodløs opvækst levede jeg mere og mere af mit egentlige liv gennem skriften. Korrespondancer, breve og dagbøger. Gradvis blev mit liv til skrift.

Det er en hård, ensom og nydelsesfuld vej.

Jeg øvede mig på at skrive for offentligheden ved at publicere småting i aviser. Features, interviews, krigs- og rejse-reportager. Jeg fik i den forbindelse en henvendelse fra et lille forlag, som tilbød at udgive en bog af mig, når tiden var inde. Jeg havde altid forestillet mig, at man som forfatter nødvendigvis måtte skrive i de eksisterende genrer. Jeg kunne slet ikke forestille mig, at man kunne skrive noget „andet“. Så jeg øvede mig på at skrive digte og romaner. Men det sagde mig egentlig ikke noget. Indtil en dag jeg gik og støvsugede. Da slukkede jeg lige for afbryderen og skrev en bog ned på fem minutter. Det var“Fri os fra kærligheden“, min debut, 1973. Den er oversat til henved tyve sprog. Siden da har alle mine bøger bevæget sig på et usikkert sted mellem fiktion og virkelighed, essay og roman.

Jeg har rejst meget i det meste af verden, jeg har brug for verden for at kunne skrive. Men alle mine bøger er skrevet i det samme værelse med udsigt til en vestsjællandsk mose.

Jeg har skrevet henved 20 bøger, som tilsammen er oversat til godt tyve sprog.

Af dem er jeg gladest for „Creme fraiche“ 1978 ( inspireret af Henry Miller). Det er en bog, hvor min egen alder og en enestående historisk periode falder sammen. Den er oversat til bl.a lettisk og japansk.

„En gris som har været oppe at slås kan man ikke stege“ (1979) er en mystikers bekendelser kamoufleret som en dagbog omhandlende flæskesteg og bankospil.

„Tone“ (1981) er en trøst til alle mennesker til alle tider.

Kostnaður 100 kr. Atgongumerkir eru at fáa í Norðurlandahúsinum, í Kunningarstovunum í Havn, Runavík, Fuglafirði.

> ”
> *I had to work for a living, and I knew no other trade, than the old known as pleasing, my name was Lady Marmalade, I sang the sing-song blues, I was wearing plateau-shoes”*
>
> *Uddrag fra Su-zen Shoes, Blå Biografi*

**Suzanne Brøgger - Priser og legater**
1975 PH prisen
1981 Prisen til de skiønne og nyttige Videnskabers forfremmelse
1982 De gyldne Laurbær
1984 Rhodos Rose
1984 Ingrid Jespersens pris
1985 Tagea Brandts Rejselegat
1987 Gabor-prisen
1992 Drama Award, Washington D.C. for the best European play.
1992 Holberg Medaljen
1993 Hammerichprisen, Louisiana
1997 Member of The Danish Academy, Rungstedlund
1999 Søren Gyldendal prisen

# Havbúnaðarfelagið heiðraði Andrias Reinert

**Tá Havbúnaðarfelagið fríggjadagin 23. februar hevði eitt fakligt tiltak fyri starvsfólkum í alivinnuni og øðrum, heiðraði felagið Andrias Reinert, sum hevur verið virkin í alivinnuni síðan í 1960’unum**

HEIÐUR

*Myndir: Vinnuhúsið*

Á fakdegnum hjá Havbúnaðarfelagnum heiðraði felagið Andrias Reinert, sum hevur verið virkin í alivinnuni síðan í 1960’unum.

Her er brot úr røðuni sum Atli Gregersen, næstformaður í felagnum helt fyri Andriasi:

Nú Andrias Reinert var givin í starvi sínum sum aliráðgevi, var tað onkur í vinnuni sum helt, at Andrias skuldi verið heiðraður fyri sín stóra leiklut at menna alivinnuna. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum helt hetta vera eitt frálíkt hugskot og hevur tí valt at heiðra Andrias á fakdegnum í dag.



*Andrias Reinert*

Tað er ein æra fyri meg at sleppa at handa Andriasi heiðurin. Andrias Reinert byrjaði á Fiskirannsóknarstovuni í 1958. Tá sílaalingin byrjaði fór Andrias í 1965 til Danmarkar og Noregs at seta seg inn í, hvussu aling av sílum fór fram.

Andrias gjørdist ráðgevi og viðspælari hjá Júst í Túni, sum var byrjaður at ala síl. Í 1973 yvirtók tað almenna allan partapeningin í P/F Fiskaaling, og tá gjørdist Andrias stjóri. Hetta starv hevði hann líka til 1995.

Síðani hevur Andrias verið aliráðgevi hjá landinum, til hann legði frá sær í 2004. Andrias hevur verið ein sera týdningarmikil maður fyri alingina í Føroyum. Hann hevur alla tíðina roynt at viðvirka til, at alingin av laksi og sílum hevur verið rikin so burðardygt sum møguligt. Edmund Joensen, sum var við í Fiskaaling tey nógvu fyrstu árini, sigur um Andrias: ”at hann var vísindamaðurin, sum alla tíðina fann fram vitan um aling. Hann dugdi væl at halda sambandið við serfrøðingar í Danmark og síðani Noregi.”

Andrias hevur ofta ávarað móti fyrilitarleysari aling, og hevur hann roynt at ávirkað til tess, at alingin gjørdist so burðardygg sum møguligt. Í dag eru allir partar í alivinnuni samdir um, at ein bert skal ala ein árgang av laksi á einum fjørði ísenn, og at tað er rætt at leggja bakk eina tíð, áðrenn nýggj smolt verða sett út. Hesi sjónarmið hevur Andrias borið fram í gjøgnum nógv ár. Samstundis sum Andrias hevur havt leiklutin sum tann, ið helt aftur, so hevur hann eisini verið íbirtarin og tann, sum royndi at finna nýggjar vegir at ganga. Ein av avmarkingunum í alingini í Føroyum er, at vatnmongdin í áunum hevur forðað fyri at ala eitt stórt tal av smolti. Í dag er endurnýtsla av vatni ein sjálvfylgja, og hesin fløskuhálsur er sostatt burtur. Andrias vísti tíðliga í tíðini á støð har endurnýtsla av vatni varð brúkt við góðum úrsliti.

Andrias Reinert hevur verið partur av teimum skiftandi almennu nevndunum ella ráðunum í nógv harrans ár, sum hava havt ein leiklut í alivinnuni. Hann sat millum annað sum formaður í aliráðnum í nógv ár. Andrias hevur fyri langari tíð síðan sagt, at alifeløgini mugu hava tríggjar firðir í part fyri at kunna reka eina burðardygga framleiðslu. Tá vit vita at talið av firðum er umleið 20, er skjótt at rokna út at tað bert er pláss fyri umleið 7 alifeløgum í Føroyum.

### Persónurin Andrias

Eg arbeiddi á Fiskaaling í fýra ár. Eg minnist Andrias, sum ein vinaligan og skemtingarsaman mann. At Andrias er ein sangari av Guds náði. Ja tað vita tey flestu. Mangar eru søgurnar um, hvussu Andrias hevur bergtikið áhoyrarar bæði innan og uttanlands, og tá alarar hava verið samlaðir, hevur Andrias ofta sett dám á veitsluna við sínum frálíka sangi. Andrias framførdi ”My way” fyrstu ferð í einari V4 sending í 1983, haldi eg tað var. Meg minnist, hvussu hann vandi vikuna upp undir sendingina, at byrja við varliga, men síðani við meira og meira lívi í. Av og til so sparraði hann í ”I did it my way”. Andrias hevur við sínari persónligheit verið ein flottur ambassadørur fyri Føroya Land. Hann hevur luttikið í samband við, at útlendingar hava vitja hendaveg og hann hevur verið til manga messuna og ráðstevnuna serliga í Norra. Allastaðni hevur hann verið væl kendur og dámdur. Nú hann nýtur sítt otium, kann hann við góðari samvitsku siga: I did it my way.



*Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag, handar Andriasi eina blómuheilsan*